# Havnar Bio

kall Coca-Cola

UMMÆLI:

## Mongum eru forløg slík – Skilnaðarstund

**Tvey møtast. Síðani kemur tíðin har tey flirta, fáa telefonnummur hjá hvørjum øðrum. Síðandi ein tíð har tey eru nýforelskaði. Eydnurík ung fólk, ið flyta saman. Alt er sum tað skal. Flotta dreymaíbúðin, ið hann (Gary) renoverar, og hon inrættar. Hon hevur góðan smak, arbeiðir í einum gallarii, og setur tí dám á innrættingina av íbúðini. So er alt perfekt, ella?**

**UMMÆLI**
*Kim Simonsen*

Myndin av vakra parinum er sum ein glansmynd úr einum blaði sum Bo Bedre ella Alt for Damerne, ella skuldi man sakt Kvinna? Ung forelskaði fólk, ið búgva nærum perfekt. Síðandi kemur tíðin, har tey møta verfamiljunum. Her er umráðandi, at alt eisini gongur sum eftir ánni og fasadan heldur, men júst her snáva tey bæði. Her fara tey, ið fyrr vóru so góð, Gary og Brooke, at hugsa um hvussu nógvar ringar síður hin hevur. Tá so gestirnir eru farnir enda tey við at fara at skeldast illa og nærum til hendurs.

Tað ringasta við hesum fólkunum, er at tey duga sera illa at skeldast. Og sum so ofta í dag, so skal sera lítið til hjá modernaða menniskjanum áðrenn hjúnarband og forhold verða til burturkast á køstinum, har særdar kenslur, einsemi og sorg finnast. Men mótgongd er eisini ein partur av lívinum, men hesin parturin passar illa við Alt for damerne veruleikan, og verður ikki toldur, so heldur skiljast enn at byggja á sátt og semju. Heldur enn at loysa problemir, loysir menniskja í dag ofta eina slíka støðu við at finna sær onkran annan, men her byrjar alt ummaftur, at brúka og blaka burtur gerðast ikki ein gleði, men ein lagna og ein vanlagna.

Ein anti-romantiskur filmur
Her er eingin semja, eingin blíðkast og eingin forsónast. Við eitt er bert spurningurin, hvør skal hava íbúðina? Tey sum elskaðu hvørt annað eru figgindar, sum bert tey sum elskaðu hvørt annað kunnu vera tað. Við eitt er íbúðin ein vígvøllur, har hin eini parturin spælir poker og hin syngur við einum kóri. Bæði royna at gera hin svartsjúkan, hesi fólkini hava einki gott at bera hvørjum ørðum og tey pína hvørt annað, tí tey pínast av støðuni. Hesin fólkini eru komin til endan á einum virðiligum lívi, ein og hvør sálarfrøðingur kundi víst teimum á, at tey liva eitt týnandi og avskepla lív.

Gary roynir at spyrja vinirnar á eini barr, um hvat er galið. Brooke tosar við sínar vinir og stjóran hjá sær, ið altíð veit hvat er gali við monnum og hvat er gali við kvinnum.

Men kunnu hesu særdu menniskju Gary og Brooke finna saman aftur, finna tað aftur, ið var




teirra forhold? Hetta er líkasum spurninguirin í øllum filminum, ið eg ikki skal avdúka svarið til her.

### Vaughn og Aniston

Vince Vaughn, ið spælir Gary, er ein góður sjónleikari og við hesum filminum er hann enn einaferð í góðum formi. Um Jennifer Aniston sum Brooke er nakað serligt veit eg ikki, dugi illa at meta um hendan sjónleikaran, ið eg síggi ov ofta. Haldi at Vaughn og Aniston er eitt løgi filmpar. Altíð eru tað hesi løgi filmparini. Eru tað ikki Nick Nolte og Julia Roberts, so eru tað Winona Ryder og Richard Gere, ella Alicia Silverstone og Benicio Del Toro, men hin vegin so er lívið fylt við avbjóðingum, møguleikum, sorg, kærleika, gleði og løgnum.

Filmurin er í støðum undirhaldandi, men líkasum alt annað vanligt amerikanskt mainstream undirhald er tað, so gloyma vit skjótt hendan filmin.

**3 stjørnur av 6**

TÍÐIRNAR:

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu




### The Break-up

*FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 28.07 | kl. 18.30 | kl. 20.45 |
| Leygardag | 29.07 | kl. 18.30 | kl. 20.45 |
| Sunnudag | 30.07 | kl. 18.00 | kl. 20.15 |




### Garfield

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Hósdag | 27.07 | kl. 15.30 | kl. 17.30 | |
| Fríggjadag | 28.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 | kl. 21.00 |
| Leygardag | 29.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 | kl. 21.00 |
| Sunnudag | 30.07 | kl. 17.30 | kl. 19.30 | |




### Pirates of Carribean 2

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | 27.07 | kl. 19.30 | kl. 22.45 |
| Fríggjadag | 28.07 | kl. 23.00 | |
| Leygardag | 29.07 | kl. 23.00 | |
| Sunnudag | 30.07 | kl. 22.30 | |




### Aqvamarine

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | 27.07 | kl. 17.45 | kl. 20.00 |
| Fríggjadag | 28.07 | kl. 23.30 | |
| Leygardag | 29.07 | kl. 23.30 | |
| Sunnudag | 30.07 | kl. 22.00 | |